# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Tað er órættvíst av bretum at brúka yvirgangslóg ímóti einum friðarfólki, sum ikki drepur annað enn fisk (Kaj Leo Johannesen)*




# Sterling Airways aftur á húsagang

**Flogfelagið Sterling, sum tann kendi presturin í Tjæreborg stovnaði á sinni, er í dag farið á húsagang fyri aðru ferð**

Eftir drúgvar miseydnaðar royndir at bjarga felagnum kunngjørdi leiðslan í Sterling Airways í morgun, at tað var ikki fíggjarligt grundarlag fyri at halda fram við rakstrinum longur. Øll flogførini hjá felaghnum vóru sett, og allar fráferðir avlýstar. Tað 46 ára gamla flogferlagið hevði mist flogið og var farið av knóranum.

Tjæreborg-presturin Ejlif Krogager stovnaði Sterling í 1962. Til 1984 var felagið partur av Tjærebnorg Rejser. Í 1993 fór Sterling Airways á húsagang og bleiv endurskipað sum Sterling European Airlines. Í 1999 keyptu norðmenn felagið, í 2005 fór tað á íslendskar hendur. Árið eftir bleiv Sterling Airways lagt saman við Maersk Air, og seinni sama árið keypti íslendska íløgufelagið FL Group Sterling. Stutt eftir keypti felagið Northern Travel Holding felagið. Í dag fór tað so aftur á húsagang.



*Bilurin hjá Jørg Haider fór sera illa*

*Mynd: Polfoto*

## Løgreglumaður seldi myndir úr bilvrakinum hjá Haider

Løgreglumaðurin, sum hevði vakt vanlukkunáttina, tók myndir av og inni í bilvrakinum og seldi tær

Dagin eftir ferðsluvanlukkuna, sum kostaði eysturríkska politikaranum Jørg Haider lívið, kunngjørdu fjølmiðlarnir myndir av tí illa farna bilinum. Men í síðstu viku komu nýggjar myndir undan kavi í blaðnum Kleine Zeitung. Summar teirra vóru tiknar uttan fyri bilvrakið, og á einari sást annar skógvurin hjá Haider liggja í grasinum við vegin. Men aðrar myndir vóru tiknar inni í vrakinum, og á teimum sóust millum annað brillurnar hjá Haider og ein eksja við tablettum ímóti tunglyndi.

Tá hinir fjølmiðlarnir bóðu løgregluna um myndirnar, vísti tað seg, at tað var ikki løgreglan, sum hevði tikið tær. Leiðslan í løgregluni fekk alt fyri eitt illgruna til løgreglumannin, sum hevði vakt vanlukkunáttina, og sum var á vanlukkustaðnum. Undir avhoyringum viðgekk hann at hava tikið myndirnar við egnum vinningi fyri eyga.

Hann er nú frítikin fyri tænastu.

# Obama kennir seg tryggan



*Barrack Obama millum trygdarmenn hjá Secret Service á valfundinum í Pittsburgh*

*Mynd: AP*

**Barack Obama kennir seg tryggan við verjuni hjá Secret Service**

Ætlanin hjá tveimum ungum nýnazistum at beina fyri Barrack Obama fær ikki tað demokratiska forsetavalevnið at broyta valstríðið. Tvørturímóti ætlar hann sær at halda fram við valstríðnum sum ætlað.

Í gjár vildi Barrack Obama ikki gera nakrar viðmerkingar til, at løgreglan hevði avdúkað drápsætlanirnar, men aftan á ein veljarafund í býnum Pittaburgh í nátt eydnaðist tað einum tíðindamanni hjá sjónvarpinum KDKA at spyrja Obama, um hann kendi seg ótryggan.

- Eg havi tey bestu trygdarfólkini í heiminum. Secret Service, svaraði Barrack Obama og legði afturat:

- Hetta er ikki tað, sum Amerika stendur fyri. Tað er ikki hetta, sum er okkara framtíð.

## STUTT SAGT

### Ivi um listarverk bankanna

Eins og í Føroyum eiga teir íslendsku bankarnir nógv listarverk og ofta av tí dýra slagnum. Men nú tað almenna hevur yvirtikið bankarnar, eigur tað almenna eisini listarverkini, og so er spurningurin, hvat skal gerast við tey.

Morgunblaðið skrivar, at fyribils eru tvey uppskot komin í Altingið um listarverkini. Í øðrum verður skotið upp, at øll listarverkini hjá teimum bankunum, sum tað almenna hevur yvirtikið, verða latnir Listasafni Íslands til ognar og varðveitslu, sum uppskotið sigur. Hitt uppskotið mælir stutt Altinginum at staðfesta, at listarverkini eru ogn ríkisins.

Tað er tó ikki øll listarverk, sum kunnu flytast, eitt nú nakrar tekningar hjá kenda listarmanninum Kjarval í aðalbankanum.

### Karadzic vil hava betri stundir

Fyrrverandi bosniaserbiski leiðarin Radovan Karadzic, sum nú situr í varðhaldi í Haag, kærir seg um, at hann fær ikki nóg góða tíð til at fyrireika verjuna í málinum, sum krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia hevur lagt ímóti honum.

Tann 63 ára gamli Karadzic er ákærdur fyri 11 ymisk brot á altjóða reglur og lógir, sum hann stóð á odda fyri ella medvirkaði til í árunum frá 1992 til 1995, tá hann var forseti í tí serbiska partinum av Bosnia. Verður hann funnin sekur, kann hann fáa lívlanga fongsulsrevsing.

Tá hann bleiv fluttur til Haag í august, segði Radovan Karadzic, at hann vildi ikki hava nakran verja, men at hann ætlar at verja segt sjálvan í rættinum. Á rættarfundi fyrradagin kærdi hann seg um, at ákærurnar ímóti sær verða broyttar í heilum, og hann vildi tí hava betri tíð til at fyrireika verju sína. Men dómarin, Ian Bonomy úr Skotlandi, helt ikki, at ákærurnar eru so nógv broyttar, at tann ákærdi eigur at fáa betri stundir til at svara teimum.

Tann 20. januar skal Karadzib aftur í rættin at svara spurningum og at seta spurningar. Enn er ikki avgjørt, nær sjálvt rættarmálið byrjar.